NORDIKLÍV

# P/F NORDIKLÍV
# LÍVSTRYGGINGARFELAG 2024

## ÁKK og ÁKP

**- Kostnaðarroknskapur 2024**

# Innihaldsyvirlit

Inngangur .......... 3
Nýttur háttur .......... 4
Avstemmingartalva .......... 7
Váttan frá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag .......... 8
Váttan frá óheftum grannskoðara um uppgerð av ÁKK og ÁKP .......... 9

# Inngangur

Hetta skriv lýsir, hvussu lyklatølini fyri árligar kostnaðir í krónum (ÁKK) og árligar kostnaðir í prosentum (ÁKP) eru uppgjørd fyri kundarnar hjá P/F NordikLív Lívstryggingarfelag.

ÁKK er krónuupphædd, sum vísir samlaða árliga kostnaðin í krónum fyri at reka og umsita pensjónsuppsparingina hjá kundanum.

ÁKP er samlaði árligi kostnaðurin í prosentum, roknaður við árslok av samlaðu pensjónsuppsparingini hjá kundanum.

Endamálið við uppgerðini av ÁKK og ÁKP er gjøgnumskygni, og at geva einstaka kundanum møguleika at síggja samlaða kostnaðin, sum vanliga verður trektur frá, áðrenn vinningur verður tilskrivaður pensjónsuppsparingini. Herundir eisini óbeinleiðis íløgukostnaðurin.

Í partinum um "Nýttan hátt" verður greitt frá, hvørjir kostnaðir eru við í uppgerðini, hvussu teir eru uppgjørdir og hvussu teir verða býttir á einstaka kundan.

Avstemmingartalvan vísir sambandið millum samlaðu upphæddina av ÁKK, sum verður upplýst fyri einstaka kundanum og samlaða beinleiðis og óbeinleiðis umsitingar- og íløgukostnaðin, sum kundarnir gjalda.

Karmarnir fyri "Nýttan hátt" eru ásettir í avtaluni millum føroysku lívstryggingarfeløgini og tvørgangandi eftirlønargrunnarnar frá 15.09.2023, "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser".

Sum tað framgongur í tilmælinum, sum avtalan byggir á, stk. 1. 2, so eru tryggingaravtalur við einkultstandandi váðadekningi ikki fevndar av avtaluni.

Hjá NordikLív eru nógv tær flestu tryggingaravtalurnar einkultstandandi avtalur uttan tilknýti til eina pensjónsuppsparing. Tí er tað einans ein lítil partur av virkseminum hjá NordikLív, sum er fevndur av avtaluni. Hetta sæst aftur í avstemmingartalvuni.

Í hesum skrivi er eisini leiðsluváttan og váttan frá óheftum grannskoðara.

NordikLív hevur ikki avtalur við miðalrentu og hevur heldur ikki fráboðað váðarenting ella gjøld fyri trygdir. Tí er hetta ikki viðkomandi at lýsa í nýtta háttinum. Hetta sæst eisini aftur í avstemmingartalvuni, har hesir postar framganga við null krónum.

Sum omanfyri nevnt, eru nógv tær flestu tryggingaravtalurnar hjá NordikLív einkultstandandi avtalur uttan tilknýti til eina pensjónsuppsparing. Avsetingarnar, sum eru knýttar at hesum partinum av virkseminum, eru váðaískoyti á skaðatryggingaravtalur, tøkniligar avsetingar til fráboðaðar skaðar, sum ikki eru liðugt viðgjørdir, og ikki-fráboðaðir skaðar. Hesin parturin av virkseminum framgongur undir "Ikki viðkomandi avtalur" í avstemmingartalvuni.

## Nýttur háttur

*Útrokning av ÁKP*

ÁKP hjá hvørjum einstøkum kunda er roknað sum lutfallið millum ÁKK hjá kundanum og uppsparingin ultimo hjá kundanum (+ tann partin av møguligum óbýttum avsetingum, sum kundin eigur) tó soleiðis, at hædd verður tikin fyri, at uppsparingin ultimo hjá einum kunda kann stava frá bæði skattaðum og óskattaðum inngjøldum.

Í hesi útrokning eru nakrar metingar gjørdar, sum eru eins fyri allar kundar og fyri øll eftirlønarfeløg og -grunnar. Hesar metingar eru ein roynd at vísa veruligu viðurskiftini, men hetta kann ikki gerast til fulnar, og tí kunnu munir vera millum, hvussu neyvt ÁKP lýsir kostnaðarprosentið hjá hvørjum einstøkum kunda.

ÁKK hjá einstaka kundanum verður greinaður í ávikavist kostnað, sum er broytiligur, og kostnað sum ikki er broytiligur í mun til støddina á uppspardu ognini.

Broytiligu kostnaðirnir svara til ítøkiliga partin av summinum av postunum 9-12, sum kundin eigur, umframt broytiliga partin av posti 17 i afstemmingartalvuni.

Óbroytiligu kostnaðirnir svara til ítøkiliga partin av summinum av postunum 2-8 og 13-16, sum kundin eigur, umframt broytiliga partin av posti 17 í avstemmingartalvuni.

*Kostnaðarpostar*

*1a – Summur avf ÁKK upplýst kundunum:*

Upphæddin er summurin av kostnaðum, sum eru upplýstir fyri kundunum.

*Kostnaðarpostur*

*2. Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir, sbr. rakstraroknskapinum*

Upphæddin fevnir um umsitingar- og nýtekningarkostnaðir, sum eisini framganga við somu upphædd í rakstrarroknskapinum hjá NordikLív.

Upphæddin skal vera tann sama, sum summurin av upphæddunum undir posti 8.1. (Útveganarkostnaðir) og posti 8.2. (Fyrisitingarkostnaðir) í fylgiskjali 3 til roknskaparkunngerðina.

Fyri partin av "Ikki-viðkomandi avtalum", sum er bólkalívstryggingarnar, framgongur tann parturin av kostnaðinum, sum beinleiðis stavar frá fyrisitingini av hesum parti, og ein partur av kostnaðinum, sum ikki beinleiðis kann tillutast á tey einstøku virkisøkini. Her er ein býtislykil gjørdur við støði í samlaða talinum av avtalum í ávísu virkisøkjunum.

Fyrisitingarkostnaður verður ikki lagdur á pensjónstryggingaravtalurnar, og tí verður upphæddin frádrigin í posti 8.

*3. Leiga av egnum skrivstovubygningi*

Upphæddin er ikki viðkomandi fyri NordikLív.

*4. Kostnaðir til tryggingarmiðlarar*
Felagið rindar ikki kostnaðir til tryggingarmiðlan, sum ikki eru við í rakstaruppgerðini.

*5. Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi í dótturfeløgum*
Felagið hevur ikki dótturfeløg.

*6. Umsitingarkostnaðir hjá uttanhýsis veitarum av tryggingartænastum*
Felagið hevur ikki fyrisitingarkostnaðir av tryggingarveitingum, sum eru útvegað frá uttanhýsis veitarum.

*7. Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir viðvíkjandi SVL-tryggingum, sbr. rakstraroknskapinum*
Upphæddin fevnir um umsitingar- og nýtekningarkostnaðir viðvíkjandi SVL-tryggingum, sum framganga undir postunum 8.1 (Útveganarkostnaðir) og 8.2. (Fyrisitingarkostnaðir) í fylgiskjali 4 til roknskaparkunngerðina.

Upphæddin viðvíkir einans bólkalívstryggingunum og er tí undir "Ikki-viðkomandi avtalum".

*Ad 8. Yvir-/undirskot av umsitingar- og nýtekningarkostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur)*
Upphæddin fevnir um yvir-/undirskot av umsitingar- og nýtekningarkostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi, ella sum verður goldin av eginognini.

Umsitingar- og nýtekningarkostnaðurin av bólkalívstryggingunum, herundir eisini SVL-tryggingarnar, verður goldin av eginognini umvegis váðaúrslitið. Kostnaðurin viðvíkjandi marknaðarrentunum verður býttur við lutfalli, sí post 2 omanfyri.

*9. Íløgukostnaðir, sbr. rakstraroknskapinum*
Upphæddin fevnir um íløgukostnaðir, sum framganga undir postunum 2.7 (Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi), í fylgiskjali 3 til roknskaparkunngerðina.

*10. Aðrir íløgukostnaðir í grunnum, dótturfeløgum, íløgufeløgum o.ø.*
Felagið hevur ikki neyvar upplýsingar um aðrar íløgukostnaðir í grunnum, dótturfeløgum, íløgufeløgum o.ø. Tí verða tey av íløgufeløgunum upplýstu ÁKP brúkt til at rokna út ÁKK.

Saldurnar við árslok verða brúktar í útrokningunum. Sostatt verður sæð burtur frá møguligum inngjøldum og útgjøldum ella øðrum flytingum, sum verða gjørdar gjøgnum árið. Útrokningin er grundað á vigað miðaltal av ÁKP, sum íløgugrunnarnir upplýsa fyri ávísu váðaflokkarnar. ÁKK verður roknað av vigaðum miðal ÁKP faldað við salduni hjá kundanum við árslok.

*11. Yvir-/undirskot av íløgukostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur)*
Felagið hevur ikki yvir-/undirskot av íløgukostnaðum, sum fella til kjarnufæfeingið ella av eginognini.

*12. Íløgukostnaðir, sum hoyra til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur)*
Upphæddin fevnir um íløgukostnaðir, sum hoyra til kjarnufæfeingið – upphæddin framgongur undir posti 9 omanfyri.

*13. Váðarenting, íroknað javning av skuggakontum*
Felagið hevur ikki fráboðað váðarenting av kjarnufæfeinginum.

*14. Gjøld fyri trygdir*
Felagið hevur ikki avtalur um gjøld fyri trygdir.

*15. Kostnaðarúrslit*
Upphæddin er ikki viðkomandi fyri NordikLív.

*16. Aðrir kostnaðir, sum kunnu útgreinast*
Felagið hevur ikki aðrar kostnaðir, sum kunnu útgreinast.

*17. Javning av kostnaðum fyri undanfarin ár*
Tað eru ongar javningar av kostnaðum frá undanfarnum árum.

*Ad 18. Til samans*
Upphæddin fevnir um samlaða summin av postunum 2-17.

# Avstemmingartalva

| Nr. | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1a | Summur av ÁKK upplýst kundunum | | | | 45 |
| 1b | Summur av ÁKK býtt út á kundar, sum antin eru farnir úr felagnum, ella har eftirlønarskjalið er skrásett sum endað | | | | 0 |
| 1c | Summur av ÁKK fyri avtalur, har ÁKK ikki er viðkomandi | | | | 0 |
| 1d | Summur av ÁKK, sum enn ikki er upplýst | | | | 0 |
| 1 | **Summur av ÁKK til kundarnar** | | | | 45 |

| Nr. | Kostnaðarpostur | Miðal-renta | Marknaðar-renta | Ikki viðkomandi avtalur * | Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|
| 2 | Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir, sbr. rakstraroknskapinum | 0 | 41 | 6.822 | 6.863 |
| 3 | Leiga av egnum skrivstovubygningi | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 | Kostnaðir til tryggingarmiðlarar | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 5 | Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi í dótturfeløgum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6 | Umsitingarkostnaðir hjá uttanhýsis veitarum av tryggingartænastum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 7 | Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir viðvíkjandi SVL-tryggingum, sbr. rakstraroknskapinum | 0 | 0 | 878 | 878 |
| 8 | Yvir-/undirskot av umsitingar- og nýtekningarkostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | 0 | -41 | -7.700 | -7.741 |
| 9 | Íløgukostnaðir, sbr. rakstraroknskapinum | 0 | 40 | 0 | 40 |
| 10 | Aðrir íløgukostnaðir í grunnum, dótturfeløgum, íløgufeløgum o.ø. | 0 | 45 | 0 | 45 |
| 11 | Yvir-/undirskot av íløgukostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 12 | Íløgukostnaðir, sum hoyra til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | 0 | -40 | 0 | -40 |
| 13 | Váðarenting, íroknað javning av skuggakontum | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 14 | Gjøld fyri trygdir | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 15 | Kostnaðarúrslit | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 16 | Aðrir kostnaðir, sum kunnu útgreinast | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 17 | Javning av kostnaðum fyri undanfarin ár | | | | |
| 18 | **Tilsamans** | 0 | 45 | 0 | 45 |
| | | | | | |
| 19 | **Postur 1 minus 18** | | | | 0 |

* *"Ikki viðkomandi avtalur" umfatar bólkalívstryggingar uttan egna uppsparing*

## Váttan frá P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag

Felagið hevur í dag lagt kostnaðarroknskapin fram, sum fevnir um "nýttan hátt" fyri uppgerð og "avstemmingartalvu" fyri roknskaparárið 2024.

Tað er okkara fatan, at "nýttur háttur" og "avstemmingartalvan" eru gjørd í samsvari við "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15. september 2023.

Tað er somuleiðis okkara fatan, at útrokningin av ÁKK og ÁKP og tey val av uppgerðarhættum, sum greitt er frá í "nýttum hátti", eru í samsvari við "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser, dagfest 15. september 2023." herundir útrokningin av ÁKK og ÁKP.

At enda er tað okkara fatan, at avstemmingin millum samanteljingina av ÁKK hjá hvørjum einstøkum kunda og ársroknskapin, umframt aðrar skrásetingar hjá felagnum, eru gjørdar í samsvari við "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser, dagfest 15. september 2023."

Tórshavn, tann 11. juni 2025

Anna Mohr Holm
Stjóri

# Váttan frá óheftum grannskoðara um uppgerð av ÁKK og ÁKP

**Til leiðsluna í P/F Nordiklív Lívstryggingarfelag**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað kostnaðarroknskapin, sum fevnir um "nýttan hátt" fyri uppgerð, avstemmingartalvu, harundir útrokning og sundurlutan av kostnaðum í sambandi við uppgerð av ÁKK (árligir kostnaðir í krónum) og ÁKP (árligir kostnaðir í prosentum) fyri Nordiklív Lívstryggingarfelag fyri roknskaparárið 2024.

Kostnaðarroknskapurin er gjørdur samsvarandi "nýttan hátt" fyri uppgerð og "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Kostnaðarroknskapurin er dagfestur tann 28.08.2025. Avstemmingartalvan vísir hesar høvuðspostar:

| | t.kr. |
|---|---|
| Samanteljing av ÁKK til kundarnar (Postur 1) | 45 |
| Kostnaðir í alt (Postur 18) | 45 |
| Munur millum Post 1 og Post 18 | 0 |

Tað er okkara fatan, at kostnaðarroknskapurin í øllum týðandi lutum er gjørdur samsvarandi "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

**Grundarlag fyri okkara niðurstøðu**

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í hesi váttan í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini av kostnaðarroknskapinum" niðanfyri. Tað er okkara fatan, at tey grannskoðaraprógv, vit hava fingið, eru nøktandi og egnað at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Óheftni**

Vit eru óheftir av fyritøkuni samsvarandi leiðreglum fyri etiskan atburð hjá grannskoðarum í International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) umframt teimum eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, eins og vit halda okkara etisku skyldur samsvarandi krøvum og IESBA Code.

**Áherðsla á viðurskifti í kostnaðarroknskapinum – nýttur háttur**

Vit vísa til nýttan hátt fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP. Kostnaðarroknskapurin er gjørdur við tí fyri eyga at vísa kundum felagsins, hvørjir kostnaðir verða rindaðir fyri eftirlønarskipanirnar hjá kundunum. Uppgerðin fevnir um samanteljing av kostnaðum, sum kundarnir rinda, svarandi til teir samlaðu kostnaðirnar, sum kundarnir rinda felagnum. Av hesi orsøk kann kostnaðarroknskapurin vera óegnaður at nýta til onnur endamál.

Okkara niðurstøða er ikki tillagað í sambandi við hesi viðurskifti.

**Áherðsla á viðurskifti viðvíkjandi grannskoðanini – ÁKK/ÁKP**

Grannskoðanin av ÁKK/ÁKP hevur fevnt um eina samanbering av samanteljingini av kostnaðum í posti 1a í avstemmingartalvuni við teir samlaðu kostnaðirnar, sum eru við í uppgerðini av ÁKK/ÁKP til kundarnar. Uppgerðin av ÁKK/ÁKP til teir einstøku kundarnar er ikki fevnd av okkara váttan.

Okkara niðurstøða er ikki tillagað í sambandi við hesi viðurskifti.

**Ábyrgd leiðslunnar av kostnaðarroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera kostnaðarroknskapin í samsvari við "nýttan hátt" fyri uppgerð umframt og "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Leiðslan hevur harumframt ábyrgd av tí innanhýsis eftirliti, sum leiðslan metir vera neyðugt fyri at gera kostnaðarroknskapin uttan týðandi feilupplýsingar, uttan mun til, um hetta skyldast sviki ella feilum.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini av kostnaðarroknskapinum**

Tað er okkara mál at fáa høga vissu fyri, um kostnaðarroknskapurin sum heild er uttan týðandi feilupplýsingar, uttan mun til, um hetta skyldast sviki ella feilum, og at geva eina váttan við eini niðurstøðu. Høg vissa er eitt høgt støði av vissu, men er ikki nøkur trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd samsvarandi altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023, altíð staðfestir týðandi feilupplýsingar, tá slíkar eru til staðar.

Feilupplýsingar kunnu íkoma sum avleiðingar av sviki ella feilum og kunnu roknast sum týðandi, um tað sannlíkt kann væntast, at teir hvør sær ella saman hava ávirkan á fíggjarligar avgerðir, sum brúkari tekur við støði í kostnaðarroknskapinum.

Sum liður í grannskoðan, sum verður gjørd eftir altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023, gera vit yrkisligar metingar og halda yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini, har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta vit váðar fyri týðandi feilupplýsingum í kostnaðarroknskapinum uttan mun til, um hetta stendst av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiði, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi og egnað at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi feilupplýsingar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi feilupplýsingar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella at við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina av innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um tann háttur, sum leiðslan hevur nýtt og lýst í pettinum "Nýttur háttur fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP", er hóskandi og um tær metingar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur lýst og nýtt, eru rímiligar.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið fyri ætlaðu grannskoðanina og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, harundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 11. juni 2025

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Fróði Sivertsen
statsaut. revisor